

www.oljan.fo

**Jan Müller** 04 - 05 - 2012

# Norra gerst ríkari og ríkari av oljuni

Norski oljugrunnurin skoraði 230 milliardir fyrsta ársfjórðing, og er samlaða upphæddin í grunninum nú uppá 3.500 milliardir krónur. Oljugrunnurin væl við Eitt av málunum, sum norskir politikarar vóru á einum máli um, tá oljan var funnin og rann upp úr undirgrundini, var, at inntøkurnar frá oljuni skuldu ikki beinleiðis út í peningarenslið. Tær skuldu í ein oljugrunn, sum síðani skuldi koma komandi ættarliðum til góða. Bara rentuinntøkur kundu verða brúktar sohvørt. Í fjør gekk ikki so væl hjá grunninum vegna búskaparligu støðuna kring heimin, men henda gongd er nú vend og hevur oljugrunnurin teir fyrstu tríggjar mánaðirnar í ár vunnið 230 milliardir krónur. Rentan av uppsparda peninginum var 7,1% sambært heimasíðuni e24.no. 60% av uppsparda peninginum í oljugrunninum stendur í partabrøvum og góvu hesi eitt avkast uppá 11% í bæði Europa, USA og Asia. Meginparturin av restini av peninginum stendur í lánsbrøvum, sum góvu eitt avkast uppá 1,6%. Støðan nógv batnað Oljugrunnurin sigur í sambandi við roknskapin fyri fyrsta ársfjórðing, at hann er sloppin heilt av við írsk og portogisisk almenn lánsbrøv og hevur somuleiðis minkað um talið á lánsbrøvum hjá statinum í Italia og Spania. Grunnurin hevur haraftrat selt út av sínum bankapartabrøvum og minkað um tey lán, hann hevur latið fleiri europeiskum bankum. Samlaði uppspardi peningurin í norska oljugrunninum er í dag uppá 3.500 milliardir krónur.